

**Hvussu eitur tú:**
Sanna Andrassardóttir Dahl

**Hvaðani ert tú:**
Hálvt havnarfólk og hálvur klaksvíksingur

**Hvat lesur tú:**
Eg taki master í bókmenta- og mentanarfrøði. Havi tvær bachelor útbúgvingar, onnur er í íslendskum máli og bókmentum frá Háskúla Íslands, og hin er í almennari bókmentafrøði úr Lund.

**Hvar lesur tú:**
Eg lesi í Lund í Svøríki, men seinasta hálva árið havi eg lisið á Bilkent Universiteti í Ankara í Turkalandi.

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Í Turkalandi er alt øðrvísi, og universitetið var ikki nakað undantak. Hóast støði var høgt, var tað í summar mátar sum at koma aftur í fólkaskúlan. Møtiskylda, uttanatslæra og karakterir fyri, hvat mann sigur í tímunum. Undirvísararnir eru altíð ógvuliga væl skipaðir og fyrireikaðir og krevja nógv av næmingunum. Um næmingarnir ikki eru aktivir í tímunum, verða teir spurdir. Næmingarnir hava ofta framløgur, og við jøvnum millumbilum eru próvtøkur. Í Reykjavík og Lund var eg von við, at tað var mest at gera beint upp undir próvtøkurnar, men á Bilkent ert tú allatíðina undir trýsti, tí tú veitst ongantíð, nær tú kemur til eina óvæntaða próvtøku. Í Reykjavík og Lund er undirvísingarháttur heilt øðrvísi, og dentur verður lagdur á, at tað er ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum at læra tað, sum verður kravt fyri at klára próvtøkurnar.

Bilkent er eitt kostnaðarmikið privat fróðskaparsetur, og tí er ikki óvanligt at síggja tey lesandi ganga við dýrum Gucci-urum og koyra í Mercedes bilum. Í Turkalandi er ein landsumfatandi upptøkuroynd til hægri læristovnar, og fyri at sleppa inn á Bilkent skal miðalkarakterurin í hesari roynd vera høgur. Tey bestu fáa lestrarstyrk frá Bilkent, men universitetið hevur eisini lesandi, sum sjálvi rinda skúlagjald. Tvey sløg av lesandi ganga har, tey, sum eru sera dugnalig og hava arbeitt hart fyri at sleppa inn, og onnur, sum hava rík foreldur. Týðiligur munur var á hesum lesandi. Teir flestu turkar, sum eg las saman við, arbeiða hart og taka eini 9 fak hvørja hálvu, hóast 5 er tað kravda, og eru tí fyri tað mesta á skúlanum ella bókasavninum. Turkisku vinirnir, eg hevði, høvdu ikki nógva avlopstíð til "at hanga út í". Teir fingu styrk frá skúlanum og tí var neyðugt at fáa góðar karakterir í øllum próvtøkunum fyri at fáa styrkin aftur komandi ár. Eg møtti ongum lesandi í Bilkent, sum hevði arbeiði við síðuna av.

Lund hevur skiftisavtalu við Bilkent, og hvørt ár sendir Lund ein næming til Bilkent og Bilkent ein til Lund. Eg søkti Bilkent sum nummar eitt og slapp inn. Eg fekk stuðul frá evropeiska felagsskapinum Erasmus, og teir guldu eisini fyri málskúla í tríggjar vikur, áðrenn universitetið byrjaði. Sum Erasmus skiftisstudentur sleppur mann til ymisk lond í Evropa og Turkalands. Av tí at eg vildi sleppa at uppliva onkra øðrvísi mentan og læra meg eitt mál, sum ikki er í ætt við tey, eg dugi, søkti eg til Turkalands.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Flestu turkisku lesandi búgva á kampus, universitetsøkinum, og í flestu kømrum búgva trý saman. Har eru duravørðar, og tað er hvørki loyvt at taka alkohol inn við ella sovandi gestir. Kampus er stórt og flott, og har eru nógvar kaféir og matstovur og alskyns hentleikar, men hóast tað royna flest allir skiftisnæmingarnir at finna íbúðir í býnum. Har kemur mann nærri at einum autentiskum turkiskum umhvørvi, og har er nógv bíligari at búgva. Tað gjørdi eg eisini, eg búði saman við tveimum italum, sum eg møtti á málskúla í Samsun við Svartahavið í fjør summar. Tað tekur umleið hálvan tíma við bussi at koyra inn í býin frá universitetinum.

**Fyrimunir og vansar av at lesa har tú vart:**
Tað var eitt sindur løgið at hava nógvar tímar hvønn dag samanborið við í Lund, har eg bara hevði heilt fáar tímar um vikuna, og at tað hartil var møtiskylda. Tað er hart at vera í skúla allan dagin og so hava eina rúgvu at lesa og uppgávur at skriva um kvøldarnar og í vikuskiftunum.

Lund er ein ótrúliga deiligur studentabýur. Har er vakurt, hugnaligt og avslappandi stemningur. Ankara er heilt øðrvísi. Har búgva eini 5 milliónir, og har er altíð nógv ferð á. Men hóast tað geva fólk sær góðar stundir at steðga á, og eitt tað fyrsta, eg hugsaði, tá eg kom til Turkalands, var, hvussu blíð, hjálpsom, opin og vinarlig fólkini vóru.

Turkaland er eitt stórt, vakurt og fjølbroytt land, maturin er eitt kulinariskt upplivilsi, málið flott, og har er bíligt at ferðast. Eg nýtti hvønn møguleika, eg hevði - í frídøgum og annaðhvørt vikuskifti at ferðast runt í landinum.

Tað hevur verið ein fantastiska spennandi og lærurík tíð, og eg vil mæla øllum til, sum hava møguleikan at fara sum skiftisnæmingur, at taka av.

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*




**Hvussu eitur tú:**
Arnfríð Lützen



**Hvaðani ert tú:**
Eg eri úr Klaksvík, men øll míni barnaár havi eg búð í Norðragøtu.

**Hvat lesur tú:**
Føroyskt

**Hvar lesur tú:**
Á Fróðskaparsetrinum, føroyamálsdeildini

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Eitt hugnaligt umhvørvi, har tað er eitt gott og tætt samstarv ímillum lærarar og næmingar. Í skúlanum eru næmingar í øllum aldri og við ymsum bakgrundum og førleikum, ið ger undirvísingina spennandi og fjøltáttaða.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Tað krevur nógv heimaarbeiði, antin við framløgum ella lesnaði. Tað er so at siga eitt fulltíðarstarv, har hvørt semestur er ymiskt, bæði við arbeiðsbyrðu og tímatali. Tó er man virkin allatíðina og lærir ótrúliga nógv fjøltáttað um føroyska málið.

**Fyrimunir og vansar av at lesa har tú ert:**
Fyrimunurin er fyrst og fremst, at tú ert í Føroyum og lesur. Á føroyamálsdeildini ert tú saman við góðum lærdum fólki og fært alla ta hjálp, ið tú hevur tørv á. Smáu viðurskiftini gera at tú fært eitt tættari tilknýti til lærarar og aðrar næmingar, heldur enn at vera ein út av fleiri hundrað, ið eftir mínum royndum ikki var heilt so gott.
Vansarnir eru í veruleikanum nokk teir somu sum fyrimunirnir. Smáu viðurskiftini gera, at útboði av lærugreinum er í minna lagi, og saknur kann vera í einum meira aktivum og livandi lestrarlívi.

**Hvussu eitur tú:**
Sølvi Simonarson



**Hvaðani ert tú:**
Klaksvík

**Hvat lesur tú:**
MSc í Altjóða Samskifti (2. semester)

**Hvar lesur tú:**
Háskóla Íslands í Reykjavík.
www.hi.is

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan:**
Háskóli Íslands (HÍ) er elsti og størsti av sjey lærdum háskúlum í Íslandi. Seks høvuðsdeildir eru á skúlanum; samfelagsvísind, heilsuvísind, hugvísind, lærara- og námsfrøði, verkfrøði- og náttúruvísindadeild og onnur fak. Undir hvørjari av hesum deildum finnast aftur aðrar deildir við ymsum serøkjum. Skúlin er sera væl útgjørdur við nýggjari tøkni, bókasavni, bókahandli, rannsóknarstovum, kaféteria o.s.fr. HÍ leggur seg eftir at verða ein hægri altjóða lærustovnur á høgum støði, við útlendskum serfrøðingum sum gestalærarum, skiftisnæmingum, undirvísing á enskum í nógvum fakum o.s.fr. Av teimum uml. 14.000 næmingunum á skúlanum eru 2/3 konufólk og 1/3 mannfólk, og áleið 1.100 eru skiftisnæmingar úr øllum heiminum.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:**
Her er eitt sera gott lestrarlív, bæði á campus, men eisini á kaffihúsum inni í býnum o.s.v. Góðir íbúðar møguleikar, bæði fyri støk og pør við børnum á studentargarðinum, har barnagarðar og skúlar liggja á campus ella beint við.

Reykjavík er ein spennandi og hugnaligur lítil stórbýur við fjølbroyttum mentanarlívi, kaffihúsum, matstovum, náttar- og handilslív. Góðir og bíligir møguleikar at flúgva til ymsastaðni í Europa og USA, og/ella at ferðast runt í Íslandi.

**Fyrimunir og vansar við at lesa har, tú ert:**
Haldi, at tað einans finnast fyrimunir, møguleikar og avbjóðingar við at lesa í Íslandi.

Fleiri upplýsingar kunnu finnast á www.mfsisland.com